viðvíkur, eitt nú kannabis, er tað heldur skítbítt at lata oftani hesi somu harkalið fara avstað við vinninginum. Hví í Guds garði ikki lata landskassan, eins og við sigarettum og rúsløgi, heysta vinningin umvegis skatting og avgjøld, ið so aftur fíggjar "tvær stovur-modellið", sum fyrst og fremst eftirlønarmóttakandi mikroøkonomurin úr Aarhus, Gunnar Thorlund Jepsen—við bóklinginum "Ti patentløsninger på ti problemstillinger"—er upphavsmaður til.

Fyrr enn vit viðurkenna, at vit taptu "kríggið ímóti narko", fara vanlukkuligar søgur sum handa um Rhys Jones ikki í søguna. Vit hava barst í tríati ár, so nú má tíðin vera komin, har vit endaliga viðurkenna, at vit taptu hatta kríggið og leggja á annan bógv við at løggilda lortið.

Tí, gera vit tað—taka vit ídnaðin aftur, sum av fyrstan tíð gjørdi hesar ótespiligu bandar so svínskt ríkar, og geva hann aftur til læknar, apotekarar og handlar við serligum loyvi—verður tað nógv truplari hjá nihilistiskum børnum at fáa atgongd til skotvápn. Hav í huga, hvat enn vit gera, fer viðhaldandi narkonýtsla altíð at vera ein sorgarleikur hjá tí einstaka narkomaninum. Men við at forbjóða narko umgera vit einans sorgarleikin til eina vanlukka fyri so nógvar milliónir afturat.

Við narkobandum ikki longur eitt føroyskt undantak, og tá ið nihilistisk børn ikki bert er eitt stórbýarfyribrigdi, eiga vit at biðja Nixon og hansara puritansku forbjóðarar um at ríða og renna! Vit hava tapt hatta "kríggið", so hví ikki bara viðganga tað, og soleiðis, bara hesa einu ferðina, faktiskt vera fyrst við onkrum sum tjóð. Narko floymir yvir sjálvt teir mest tómligu blettar á knøttinum, og sum bandarnir vaksa, røkka teir longri fyri hvørt ár. Og við teimum koma skotvápn, ið drepa tilvildarligan ungdóm á veg heim frá fótbóltsvenjing.

Ella skula vit bara halda fram við at tapa, og bíða eftir eini endurtøku av tí, sum hendi í Liverpool?

# Útlendingar – Who Cares?

## Tinghella



**Bogi Eliasen**
be@implementer.dk



Føroyar gerast so við og við meira alheimsgjørdar. Ein partur av hesum eru vaksandi talið av útlendingum, sum búgva í Føroyum. Nógvir útlendingar eru giftir til Føroyar, men eisini fleiri útlendsk pør búgva á klettunum.

Føroyingar hava í nógv ár leita sær út í heim og eingin ivi er um at vit stolt siga frá at Føroyingar eru kring allan heimin, eins og okkum dáma sera væl at ferðast.

### Stigatakarar

Eitt av hesum pørum sum hava verið víða um, eru Turið og Snorri Brend.

Tey vita av royndum, at tað kann verða torført og einsligt at verða staddur úti í heimi og tá tey vóru í London, tók ein kirkja har stig til at hava hugnaløtur fyri útlendingum. Hetta hava tey so avgjørt at seta í verk í Føroyum og í fyrsta umfari verða hesar hugnaløgurnar einaferð um mánaðin í Meinigheitshúsinum í Havn.

### Stórur tørvur

Fyrsta hugnaløtan var leygardagin 1. september og har vóru einir 20 útlendingar. Tað skiltist beinanvegin á prátinum, at stórur tørvur er á einum slíkum tiltakið, serliga tí at nógvir útlendingar ikki vita hvat ber til og ikki í Føroyum. Harumframt kann tað verða ein stór hjálp at hava samband við onnur í somu støðu.

### Málførleiki

Serliga var gjørt vart við at flestu arbeiðspláss krevja føroyskan málkunnleika, men myndugleikarnir hava ikki skipaða málsundirvísing sum ger, at fólk sum vilja, kunnu læra seg føroyskt og brúka sínar førleikar í Føroyum.

Eitt annað sum var havt á lofti, er hvussu ótrúliga tvørligt tað er at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi og hvussu mannminkandi tann tilgongdin og bíðitíðin er.



Henda løtan í Meiniheitshúsinum var hugnalig, gevandi og mennandi. Tað eru hópin av fólki, sum ikki eru fødd her, men sum fegin vilja brúka sína orku uppá Føroyar við at búgva og arbeiða her.

### Vilja vit?

Men spurningurin sum hongur eftir er; vilja vit hava tey her? Vit eru ikki hjálpsom tá talan er um útlendingar og um vit hugsa um myndugleikarnar, so ivast man í um nakar politikari í Løgtinginum ella Landsstýrinum kennir nakran útlending, sum býr í Føroyum. Okkara væntandi hjálp og/ella skipanir eru hjá nógvum eitt so forðandi haft um beinini, at øll við innlitið í hesi viðurskifti trúgva ikki tí tey síggja.

### Politiskt og tann einstaki

Evni má takast upp politiskt m.a. tí at seinastu tíðina hava tíðindi javnan verið frammi um útlendingar og mismun. Vit hoyra um tað í samband við ítrótt, starvsetanir og annars bara í dagliga samfelagnum og kanska serliga í samband við arbeiðs- og uppihaldsloyvir

Tað er eingin ivi um, at vit ikki megna at bjóða útlendingum nóg væl til Føroyar, og tað er bæði ein uppgáva hjá tí einstaka at verða við til at betra um hesi viðurskifti, men størstur tørvur er á at Landsstýri og Løgting slóða fyri við at gera tað lættari at verða útlendingur í Føroyum.

Henda hugnaløtan vísti á, at vit hava fólk sum vilja verða her, sum eru góð við Føroyar. Eydnutíð hava vit eldsálir og sannar heimsborgarar sum Turið og Snorra um vilja verða við til at hjálpa útlendingum at støðast í Føroyum og tað eru fleiri við teimum.

Vit hava eins og grannalond okkara tørv á arbeiðsmegi og vilja vit hava at fólk at støðast her og at liva seg inn í føroyska samfelagið, mugu vit eisini geva teimum møguleika at læra seg málið og mentanina. Fleiri dømir eru um útlendingar við útbúgvingum, sum er eftirspurd í Føroyum, men sum ikki fáa starv orsaka av málsliga førleikanum. Tað eru nøkur tilboð til at læra føroyskt, men ikki í so stóran mun, sum krevst. Tað tilboðið má verða ein uppgáva hjá lands-mynduleikunum at taka sær av.